**Semja millum øðrumegin Føroya Pedagogfelag og hinumegin Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

**1.** Sáttmálarnir og tænastumannaavtalan verða endurnýggjaðir fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober 2013 til 1. oktober 2015.

**2.** Tann 1. oktober 2013 hækka mánaðarlønirnar 190 kr og 0,9%. Tann 1. oktober 2014 hækka mánaðarlønirnar 1,9%.

**3.** Eftir tann 1. oktober 2013 verða gjøldini fyri ólagaliga arbeiðstíð roknað sum fast prosent av tímalønini á stigi 11, kvøld 18%, nátt 22% og leygardag 25%.

**4.** Í pedagogsáttmálanum verður ásett, at leiðarar á dagstovnum, har GFT- talið er størri enn 290, ganga stigini 28, 30, 32 og 34.

**5.** Flokkingar, sum avvarðandi partar eru samdir um, verða skrivaðar inn í sáttmálarnar, eins og ikki longur aktuellar flokkingar verða tiknar út úr sáttmálunum. Flokkingarmál, sum eru ikki liðug, verða avgreidd innan 1. mai 2014.

**6.** Avtalur um fráfaringaraldur verða strikaðar, t.e. § 27 stk. 5 í pedagogsáttmálanum, § 17 stk. 4 í hjálparfólkasáttmálanum.

**7.** Í pedagogsáttmálanum verða greinarnar 33 og 34 strikaðar, og í hjálparfólkasáttmálanum verða greinarnar 23 og 24 strikaðar.

**8.** § 28 í pedagogsáttmálanum og § 18 í hjálparfólkasáttmálanum verða soljóðandi:
*Ivaspurningar um at tulka sáttmálan verða at leggja fyri Fasta Gerðarrætt.*

**9.** Greinarnar um gildiskomu verða broyttar samsvarandi hesari semju (eisini nummar).

*Í Havn tann 15. januar 2014*

*Kommunala Arbeiðsgevarafelagið*

*Føroya Pedagogfelag*

*Fíggjarmálaráðið*